Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

*3. mai 2021*

# UMMÆLISSKRIV

***viðvíkjandi***

**uppskoti til løgtingslóg um Føroya Kærustovn**

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya (BLF) takkar fyri høvið at gera viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um Føroya Kærustovn.

BLF tekur sum heild undir við uppskotinum, sum á skynsaman hátt skipar virksemið hjá Føroya Kærustovni. BLF tekur serliga undir við § 1, sum skipar Føroya Kærustovn, sum ein óheftan fyrisitingarligan myndugleika, sum í sínum virksemi er óheftur av tænastuboðum í einstøkum málum. BLF leggur til merkis, at tað í viðmerkingunum er greitt gjølliga frá funktionella óheftninum, sum er av avgerandi týdningi fyri at tryggja, at politisk ella onnur uppíblanding verður avskorin, og at Føroya Kærustovnur kann virka við trúvirði og við tí virkisføri, sum ein kærustovnur skal hava.

Í viðmerkingunum til uppskotið verður mælt til at halda fast við einstreingjaða bygnaðin, sum Kærustovnurin hevur í dag, soleiðis at stovnurin ikki verður skipaður við deildum. Víst verður á, at stovnurin er lítil, og neyðugt er at vera smidligur, so til ber at umskipa og býta arbeiðsorkuna eftir, hvussu nógv mál eru, og hvussu starvsfólkahópurin broytist. Hesum tekur BLF undir við.

Í viðmerkingunum stendur eisini, at tann einstreingjaði bygnaðurin kann hava við sær, at starvsfólk eiga at fáa viðbót, sum samsvarar við ta eyka ábyrgd og neyðugu servitan, sum liggja í nýggju uppgávunum. BLF tekur undir við, at starvsfólk fáa viðbøtur, sum svara til ábyrgd og servitan, og hevur hetta alstóran týdning fyri at fáa dugnalig starvsfólk at støðast. BLF skal vísa á, at lønarviðurskifti hjá starvsfólkunum á Kærustovninum eru avtalað í sáttmála, og at tað í sáttmálanum millum BLF og Fíggjarmálaráðið eru ásetingar um serfrøðingaviðbøtur, sum tað hevði verið viðkomandi at umrøtt í uppskotinum.

**Vinarliga**

**Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya**